

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 11 - 2011

# Grønland skal hava oljuoyggj

Royndarboringar og seismiskar kanningar undir Vesturgrønlandi krevja so nógva og stóra útgerð, at tað er ikki pláss fyri útgerðini á havnarlagnum í Aasiaat. Tí hevur Qaasuitsup kommuna nú skotið upp, at oyggin Tupilak verður brúkt til at hýsa virkseminum, sum er knýtt at frálandavinnuni. Tað eru stórar ætlanir um útbyggingar í Aasiaat fyri at tryggja býnum pláss sum útgerðarhavn í sambandi við oljuleitingina. Men hetta krevur stór øki, og tí er ætlanin at brúka alla Tupilak-oynna. Hon er góðar tvær milliónir fermetrar til støddar og hýsti einari amerikanskari herstøð undir seinna heimsbardaga. Qaasuitsup kommuna hugsar ikki bara um tað, sum hevur við sjálva leitingina á sjónum at gera. Tí hava tankar verið frammi um at tryggja býnum betri flogsamband. Men tað er ikki bara í Aasiaat, at fólk vænta sær størri virksemi orsakað av oljuleitingini. Ætlanir eru longu um at byggja útgerðarstøðir í Qasigiannguit, Ilulissat, Qeqertarsuaq, Qaarsut og Upernavik Kujalleq, sigur grønlendska útvarpið.